# Virkisbygningur til sølu!

Virkisbygningurin á matrikulnr. 118b á havnarlagnum í Oyndarfirði verður við hesum lýstur til sølu.

Høvuðsbygningurin, har arbeiðshøll og kølirúm eru, er: 18,4 x 32,8 m = 604 fermetrar. Síðubygningurin har frystirúm, maskinrúm, toilettir, kantina og skrivstova er, er: 4,2 x 32,8 m = 138 fermetrar. Soleiðis er talan um 742 fermetrar tilsamans.

Byggiár 1980.

Høvuðskonstruktiónirnar eru stálrammur. Útveggirnir eru løtt sandwich element sum eru klødd innan og uttan við litaðum stáli. Ímillum er bjálvað við skúmi. Tekjan er stálprofilplátur undir (loft) og omaná (tak). Z-profilar av stáli eru ásir og bjálva er við mineralull.

Aðrir upplýsingar bygninginum viðvíkjandi fáast frá borgarstjóranum á tel.: 22 37 14

Møguligar umsóknir skulu verða bygdarráðnum í hendi í seinasta lagi 5. okt. 2004

Bygdarráðið tilskilar sær rætt at velja ímillum tey innkomnu boðini, ella einki at taka.

**Oyndarfjarðar kommuna**



# Massaga:

NÝTT NÝTT NÝTT NÝTT NÝTT NÝTT NÝTT

**Dr. Magic** nú í Føroyum !

Í okkara nýggja "Relax Room" í J.C. Svabosgøtu, hava vit nú aftur okkurt nýtt og gott at bjóða.
Vit hava verið runt knøttin og leitað, og hava funnið tað besta av tí besta innan massagustólar. Stólurin eitur ikki minni enn Dr. Magic.

**Dr. Magic:**
Hevur ein telduskerm sum vísir hvussu og hvar tínar vøddaspenningar eru, finnur tínar akslar og kann veruliga taka fatt.

· Nakka massagu
· Rygg massagu
· Lenda massagu
· Trýstmassagu til endan og leggjar
· Zoneterapi
· o.a.

Teldustýrt programm júst eftir tínum kroppi

**Kom og royn hann!**




*OBS. Hinir stólarnir eru eisini her sum vanligt. Dr. Magic kostar 2 klipp*

Opið er hvønn gerandisdag kl. 12.00 - 17.30
Leygardag 10.00 - 14.00 og eftir nærri avtalu.

*Gávukort fæst!*

Sosialurin 341800

*"Massagen giver indre ro og ydre velvære."*
*Stolen går virkelig i dybden, og giver rigtig massage. Den er god til af finde de ømme punkter, og løsne for spændte muskler. Behandlingen virker både terapeutisk og afstressende.*
*Efter en lang arbejdsdag som fyrioterapeut, med handicappede børn og unge bruger Eliza selv massagestolen til at forebygge rygproblemer og smerter. Hun anbefaler at den bruges hveranden dag for at forebygge rygproblemer og smerter.*



*Eliza Jacobsen, Vittarp, Fysioterapeut*

Ergo & Hjálpartól
J.C. Svabosgøta 8 · FR-100 Tórshavn · Tel 315 777 · Fax 315 772 · Fartel 215 778
Teldupost: ergo@ergo.fo · Heimasíða: www.ergo.fo


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3849
**Navn: Sp/f Timburhandilin Sand**

**Adressa**: 210 Sandur
**Kommuna**: Sands Kommuna
**Stovningardato**: 13.09.2004
**Viðtøkudato**: 13.09.2004
**Kapitalur**: Kr. 295.000,00
**Inngjaldingarháttur**: Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100 og kr. 285.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
**Stovnarar**: William Sand **Davidsen**, 210 Sandur og Niels Johannus Tjaldrastein, 210 Sandur.
**Stjórn**: William Sand Davidsen, 210 Sandur.
**Tekningarreglur**: Felagið verður teknað av einum stjóra.
**Grannskoðari**: Sp/f Grannskoðaravirkið Hermund Jacobsen, J. Broncksgøta 16, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 13.09.2004 - 31.12.2005
**Endamál**: Endamál felagsins er at eiga og reka handil og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 17. september 2004

Kristin Balle


# Frá S & K felagnum

S & K felagið bjóðar til kunnandi fund í hølunum hjá arbeiðarafelagnum Hæddini í Runavík mikukvøldið 22.09.2004 kl. 20.00.

**Skrá**
Kunning um:
S & K felagið
lønarsáttmálan
eftirlønargrunnin
lívstryggingarskipanina

Eisini ber til at seta nevndini fyrispurningar.

Limir felagsins og annars øll áhugað eru vælkomin.

Við á fundinum verður nevndin hjá S & K felagnum og stjórin fyri eftirlønarskipanina.

*Vinarliga*
**S & K felagið**



**Suðurstreymoyar Javnaðarfelag**

# Uppstillingarfundur

2. og 3. uppstillingarfundur til kommunuvalið 2004 verður mikudagin 22. september kl. 20.00. Fundurin verður í hølunum hjá Starvsmannafelagnum, J. H. Schrøtersgøta 9.

Øll eru vælkomin.

**Nevndin**











# Finn dreymahúsið í Sosialinum

SETHÚSAMARKNAÐURIN




# Flogvøllurin forðar hotellinum



*Hotel Vágar ætlar at byggja ein tilbygning í tveimum hæddum aftur at verandi hotelli. Men tað fer at órógva radarskipanina, sum flogvøllurin brúkar til innflúgvingina, so tað ber ikki til*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Ætlaða útbyggingin á Hotel Vágum verður í løtuni tarnað av, at flogvøllurin ikki hevur nútíðarhóskandi innflúgvingartól. Hotellið fær ikki bygt sum ætlað, tí bygningurin kemur upp fyri radarsignalini hjá flogvøllinum**

HOTELBYGGING
*Edvard Joensen*

**Vágar:**
Ein útbygging av Hotel Vágum, verður helst ikki, sum eigararnir hava ætlað, tí tað fer at órógva innflúgvingartólini hjá flogvøllinum. Ætlaði bygningurin fer at forða radarsignalunum, sum flogvøllurin í dag nýtir.

Eigararnir av Hotel Vágum hava ætlanir um at bygja hotellið út. Biðið er um at sleppa at byggja ein tilbygning í tveimum hæddum í ovara enda á verandi hotelli. Men tað sleppa tey ikki at gera sum er, sigur Kári Hentze, leiðari á Hotel Vágum.

Grundin er tann, at bygningurin verður so mikið høgur, at hann fer at virka sum ein skermur fyri radarsignalunum, sum flogvøllurin, ið er granni hjá hotellinum, brúkar til innflúgvingina yvir Sørvágsfirði.

Søgan um innflúgvingartólini, ta sonevndu glíðibreytina, sum í áravís hava ligið niðurpakkað orsakað av væntandi figging til uppseting, er kend. Og alla hesa tíðina hevur flogvøllurin so brúkt ta gomlu skipanina, sum ikki gerst meira tíðarhóskandi, sum árini líða.

Og nú vísir tað seg so, at tann ætlanin, sum hotelleiðslan hevur fyri eini útbygging á Hotel Vágum, kann ikki gerast, tí avvarðandi myndugleikar ikki kunnu finna út av at útbyggja flogvøllin tíðarhóskandi, sigur leiðarin á Hotel Vágum.

Onnur alternativ eru sjálvandi, sigur Kári Hentze, men hendan ætlanin við tilbygningi í tveimum hæddum er tann, sum teimum dámar best. Men hon bíðar so í løtuni eftir grønum ljósi frá SLV.

Roynt varð at fáa eina viðmerking frá Finnboga Niclasen, flogvallarovasta, men hann var ikki at hitta, áðrenn blaðið fór til prentingar.

# Oskar gróv fyrst

**Lítli Oskar slapp at grava fyrsta flagið oman av fyri nýggja dagstovninum í Sørvági**

DAGSTOVNUR
*Edvard Joensen*

**Sørvági:**
Byrjað varð at grava út fyri nýggja dagstovninum i Sørvági mánamorgunin. Tað var Oskar, ið gongur í barnagarðinum Sýsluni, sum slapp at grava fyrsta flagið omanav, og Borgarhjørt, sum er leiðari í Sýsluni, slapp at hjálpa til.

Tað var hátíðarløta hjá børnunum í dagstovninum í Sørvági, tá tey mánamorgunin øll komu niðan á Mýrar at vera hjástødd, tá arbeiðið upp á nýggja dagstovnin varð sett í gond.

Fyrst gróvu Oskar og Borgarhjørt fyrsta flagið omanav, og síðan kom Kristian við stóru gravimaskinuni og gjørdi eitt rættiliga stórt hol í vøllin.



*Oska slapp at grava fyrsta flagið oman av fyri nýggja dagstovninum í Sørvági*

*Mynd: Edvard Joensen*

Eivin Jacobsen, borgarstjóri í Sørvági, sigur, at nú verður jørðarbeiðið gjørt. Tað er Kristian Olsen í Sørvági, sum ger tað. Restin verður boðið út. Helt í hesi vikuni, heldur hann, og einaferð næsta heyst vænta tey, at klárt verður at flyta inn.

Tað fara umleið 100 børn at ganga í nýggja dagstovinum, sum væntandi fer at kosta út móti 10 milliónum.

# Hotel Vágar nýggja bókingarskipan

**Hotel Vágar fær í næstum nýggja skipan, sum ger tað møguligt hjá fólki at síggja á internetinum, um nakað kamar er tókt og samstundis bíleggja beinleiðis**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*

**Vágar:**
Tað verður í framtíðini lættari at biða um innivist á Hotel Vágum. Væl at merkja, um tú hevur internetsamband. Tí skjótt fer at bera til at bíleggja kamar umvegis internetið, og tú sært eisini við tað sama, um nakað rúm er tókt, og hvar tú fert at búgva, tá tú kemur á hotellið.

Hetta hevur eisini fyrimunir fyri, tey, sum starvast á hotellinum, sigur Kári Hentze, leiðari á Hotel Vágum. Tí nýggja skipanin ger, at nú verður ikki neyðugt hjá starvsfólkinum at nýta so nógva tíð at leita og skráseta, sum neyðugt er, tá øll skulu ringja og bíleggja um telefonina.

Tá skal starvsfólkið fyrst tosa í telefon við kundan. Síðan leita eftir møguligum leysum rúmum, fyri at enda at boða frá aftur til kundan um, hvat og hvussu.

– Vit hava ikki fast fólk í móttøkuni, sigur Kári Hentze, og tað ger, at tað kann henda, at tann, sum tekur telefonina, ikki er staddur júst har, listin liggur. Tí kann nógv eykaarbeiði spyrjast burturúr, áðrenn avgreiðslan er liðug.

Við nýggju skipanin slepst undan øllum hesum, og kundin veit við tað sama, hann hevur trýst á knøttin, at hann hevur fingið eitt kamar.

Kári Hentze roknar við, at tað í stóran mun fyrst vera ferðaskrivstovur og fyritøkur, sum far at nýta hendan nýggja háttin at checka inn. Men tað ber sjálvandi eisni til hjá vanligum fólki. Goldið verður við korti um internetið, sigur hann. Hann væntar sær nógv av hesi nýggju skipanini, sigur leiðarin á Hotel Vágum.

Tað er Flogfelag Føroya, sum eigur Hotel Vágar. Flogfelagið leigar eisini bilar út, og Kári Hentze sigur, at tey arbeiða eisini við at fáa leigubilarnar inn í hesa online skipanina, so fólk eisni umvegis internetið kunnu leiga sær ein bil.

Flogfelag Føroya og Hotel Vágar vóru við á VestNordenTravel Mart ferðavinnustevnuni í Reykjavík í seinastu viku.

Kári Hentze sgiur, at nakað av fólki vitjaði básin hjá teimum, men tey meta seg kortini onkuntíð at hava havt fleiri vitjandi á slíkum stevnum. Tað vóru fleiri gamlir kenningar, sum vitjaðu aftur, sigur hann.

Leiðarin á Hotel Vágum tekur væl ímóti ætlanini hjá Atlatnsflogi um at fara at flúgva ferðafólk við tyrlu til Mykinesar hvønn leygardg komandi summar.

– Eg meti, at tað kann geva okkum nakrar møguleikar á Hotel Vágum, sigur hann. Fólk, sum koma og fara um flogvøllin, hava stutt at fara til hotellið. Tað er ideelt til yvirnátting her, og vit kunnu eisini selja hesar túrarnar til fólk, sum vit frammanundan hava á hotellinum, heldur hann.

Hann kennir annars lítið til hesa ætlanina, men metir at eitt nú matpakkar til slíka rútferðir kann Hotel Vágar saktans lata fólki.

Um árið, íð nú líður so væl, sigur Kári Hentze, at tða hevur verið hampiligt hjá hotellinum.

Og tað, ið eftir er, sær ikki so galið út heldur. Hotel Vágar plagar at skipa fyri ymsum tiltøkum. Serliga hesa tíðina til jólar eru fleiri jólaborðhald, sum tey flestu longu eru útseld í ár. Vínsmakking er eitt tiltak, hotellið plagar at hava, og okkurt slíkt er í umbúna, sigur Kári Hentze.



*Kári Hentze umboðaði sjálvur annar Flogfelag Føroya og Hotel Vágar á VestNorden Travel Mart í Reykajvík í seinastu viku*

*Mynd: Edvard Joensen*